# Tjaldrið bjargaði stevnuhýrinum

***5–mannafør dreingir:** Sigurin hjá dreingjunum, sum róðu í heimasjógvi, var tann mest sannførandi í øllum kappingunum*

Eysturoyingurin er uppsteðgaður. Sigursrøðin hjá 10–mannafarinum í Runavík varð brotin í Klaksvík, og í Runavík var tað staðfest, at manningin, sum tvey tey undanfarnu árini hevur vunnið allar tólv FM róðrarnar, ikki er so væl fyri nú, sum hon hevur verið.

Men tað er eingin orsøk hjá teimum í róðrarfelagnum NSÍ og hjá øllum teimum mongu, sum taka á við teimum, at órógvast um framtíðina. Úrslitini bæði á norðoyarstevnu og skálafjarðarstevnu boða frá, at framtíðar manningin á Eysturoyingi væl og virðiliga ger seg klára at manna tíggjumannafarið, tá nógv vinnandi og kanska eitt sindur mettu menninir fara at mynstra av.

Toftabáturin var næstfremstur í kappingini millum 8–mannafør, og í dreingjakappingini var nýggja Tjaldrið so nógv fyrst á mál sum eingin annar bátur var í nakrari kapping leygardagin.

Tórbjørn Jacobsen handaði eftir kapppróðurin steyp og heiðurskrónur á havnarøkinum í Runavík. Hann kundi saman við hinum í Runavíkar kommunu fegnast um, at dreingirnir umborð á Tjaldrinum høvdu vart kapppróðrarheiðurin hjá eyðkendu gulu bátunum.

Tjaldrið fleyg avstað, tá startdómarin skeyt fyri fyrsta róðrinum á Skálafjørðinum. Tá teir fyrstu eitt hundrað metrarnir vóru lagdir afturum, var Tjaldrið meiri enn eina hálva bátslongd frammanfyri allar hinar, og áðrenn tvey hundrað metrar vóru farnir, var Tjaldrið leyst av hinum bátunum.

Tá bátarnir komu inn móti málinum, var talan um uppvísning í heimasjógvi hjá Tjaldrinum. Guli báturin var einar níggju ella tíggju bátslongdir undan hinum bátunum um málið, og tað tykist sum um, at tað skal meiri enn vanlig kapping til, um hugsningur skal vera um, at onkur skal taka Tjaldrið í teimum fýra FM kapppróðrunum, sum framvegis eru á skránni í hesum árinum. Tjaldrið hevur ikki vunnið FM síðani í 1991.

Kappingin var stór um næstfremsta plássið. Kollur var eina bátslongd undan næstu bátunum um málið. Drekin og Havfrúgvin komu í fylgi um málið. Tá teir fóru at kanna, hvør av hesum báðum bátunum var frammanfyri hin, vísti tað seg, at Drekin og Havfrúgvin fóru akkurát í senn um málstrikuna. Frá m.a. svimjing, skíing og súkkling er tað ikki ókent, at somu tíðir verða givnar. Reglarnir fyri kapppróður leggja upp fyri hesum í grein 22. At Drekin og Havfrúgvin fóru í senn um málið hevði við sær, at báðir bátarnir fingu fýra stig, meðan eingin bátur fekk trý stig.

Í fjør vann Havfrúgvin, sum tá var nýggj, FM. Higartil í ár hevur ikki skorist nakað serligt hjá vestmannabátinum. Men Havfrúgvin stóð seg betri hesa ferð, enn hon gjørdi á norðoyarstevnu.

Í ár er Tjaldrið nýtt. Manningin tykist vera sera stinn, og alt bendir á, at Tjaldrið fer at røkka heilt langt í øllum teimum fýra kappingunum, sum framvegis eru á skránni í summar.

JH



*Tjaldrið var einasti báturin hjá vertunum úr Runavík, sum megnaði at toga ein sigur í land av heimasjógvi*
*Mynd: J. Jacobsen*

# Krøv verða sett manningini á Hvessingi

***6–mannafør menn:** Sjálvsálitið er í topp á ungu monnunum, sum droyma um at vinna rættin at luttaka í altjóða kappingini á Scillyoyggjunum*

Menninir umborð á Hvessingi eru væl á veg til at vinna sætta meistaraheitið síðani 1993. Teir vunnu á norðoyarstevnu, og á Skálafjørðinum endaðu teir enn eina ferð ovast í stríðnum millum bátarnar í Sundalagnum og av Skálafjørðinum um stig og heiður.

– Tað skal ikki vera nøkur loyna, at vit droyma um at vinna kapppróðrarferðina niður á Scillyoyggjarnar. Skulu vit røkka so langt, so er tað neyðugt, at vit vinna róðrarnar, sum vit taka lut í. Um vit gera tað, so fáa vit at síggja, hvussu tað gongst í hinum kappingunum.

Tað er Báraldur Joensen, sum vit tosa við. Hann er bátsformaður á Hvessingi úr Hvalvík/Streymnesi. Hann situr á lærinum í bakborði, og hann dylur ikki, at lagið er gott og hugurin at venja og kappast er fínur:

– Vit búgva allir í Hvalvík og Streymnesi. Hvessingur hevur vunnið nógv, og vit eru greiðir yvir, at her í økinum verður tað roknað við, at vit ætla okkum at leggja nógv fyri at vinna, tá vit manna Hvessingin. Tá vit fóru á norðoyarstevnu, vóru vit ikki vísir í, hvussu tað fór at hilnast. Vit vóru bara nummar trý, tá vit róðu á bygdarstevnuni á Skála. Tá vit vunnu í Klaksvík, var kappingin sera hørð. Tá vit fóru á eystanstevnuna, høvdu vit størri sjálvsálit, enn vit høvdu á norðoyarstevnu, og hesa ferð vóru vit vísir í, at vit høvdu vunnið, tá vit fóru um málið.

## Grannastríð í stórum álvara

Á norðoyarstevnu fekk Hósvíkingur ein so framúr góðan start. Á Skálafjørðinum startaði Hósvíkingurin eisini væl, men hesa ferð lá tað eisini beinanvegin væl fyri hjá Hvessingi, og Kollfirðingurin var eisini væl við í kappingini fyrstu løtuna.

Tá bátarnir komu inn á eitt túsund metra málið, hevði Strálan av Strondum hug at blanda seg upp í kappingina millum teir fremstu. Kollfirðingurin datt fullkomuliga burtur ímillum í oddastríðnum, men bæði Hósvíkingur og Strálan megnaðu mest sum alla tíðina at halda Hvessingin í ikki alt ov longum tjóðri. Men hvørki grannarnir úr Hósvík ella strandingar megnaðu av álvara at hótta teir úr Hvalvík og Streymnesi, sjálvt um teir gjørdu onkra roynd.

– Vit høvdu teir alla tíðina í eygnakrókunum, og vit vistu, hvussu langt vit vóru komnir, og hvat bíðaði okkum. Frarmmanundan róðrinum høvdu vit ítað alt róðrarøkið av. Vit tóku fimtan tøk í startspurtinum. Undir róðrinum róðu vit seigan. Onkra ferðina, tá vit hildu, at ferðin var minkað eitt vet, tóku vit fimm stór tøk. Vit høvdu roknað tredivu tøk til endaspurtin. Vit høvdu sett ein bil á tað staðið, har vit ætlaðu at spurta frá, og tað vísti seg at rigga væl. Vit fóru um málið á endaspurttaki nummar tredivu, greiðir bátsformaðurin á Hvessingi, Báraldur Joensen, frá.

Talan er um unga manning umborð á Hvessingi. Miðalaldurin er 20 ár. Elsti maður er 24 ára gamal, og yngsti maðurin er bara 16 ára gamal. Hann roynir seg á fyrsta ári. Tríggir teirra, sum vunnu FM í fjør, eru við aftur í ár. Tveir, sum vóru við at vinna FM við Hvessingi øll árini frá 1993 og til og við 1995, eru komnir umborð aftur, og stýrimaðurin hevur áður verið umborð á 5–mannafarinum Báruni.

Umborð á Hvessingi hava teir lagt nógva orku í fyri at røkka so langt, sum teir hava gjørt á norðoyarstevnu og á skálafjarðarstevnu. 25. mars fóru teir undir rennivenjingina, og síðani flaggdagin hava teir vant við Hvessingi. Úrslitini í teimum báðum fyrstu stevnunum boða frá, at tað hevur verið væl vant!

jh



*Hóast hósvíkingar eisini royndu at gera um seg, so eydnaðiast tað teimum umborð á Hvessingi at basa grannunum*
*Mynd: J. Jacobsen*



# EURO 2000 endaspælið

## Bólkur A

**Rumenia-Portugal 1-0 (0-0)**
1-0: Da Costa 94.

**Ongland-Týskland 1-0 (0-0)**
1-0: Shearer 52.

**Støðan**

| | v | j | t | mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Portugal | 2 | 0 | 0 | 4-2 | 6 |
| 2 Ongland | 1 | 0 | 1 | 3-3 | 3 |
| 2 Týskland | 0 | 1 | 1 | 1-2 | 1 |
| 3 Rumenia | 0 | 1 | 1 | 1-2 | 1 |

**Komandi dystir:**

20.06 Ongland-Rumenia

20.06 Portugal-Týskland

## Bólkur B

**Turkaland-Belgia 0-2 (0-1)**
0-1: Sukur 45.
0-2: Sukur 70.

**Italia-Svøríki**
1-0: Di Biagia 39.
1-1: Larsson 77.
2-1: Del Piero 88.

**Støðan**

| | v | j | t | mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Italia | 3 | 0 | 0 | 6-2 | 9 |
| 2 Turkaland | 1 | 1 | 1 | 3-2 | 4 |
| 2 Belgia | 1 | 0 | 2 | 2-5 | 3 |
| 3 Svøríki | 0 | 1 | 2 | 2-4 | 1 |

## Bólkur C

**Slovenia-Spania 1-2 (0-1)**
0-1: Raul 4.
1-1: Zahovic 58.
1-2: Etxeberria 60.

**Noreg Jugoslavia 0-1**
0-1: Milosevic 8.

**Støðan**

| | v | j | t | mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Jugoslavia | 1 | 1 | 0 | 4-3 | 4 |
| 2 Noreg | 1 | 0 | 1 | 1-1 | 3 |
| 3 Spania | 1 | 0 | 1 | 2-2 | 3 |
| 4 Slovenia | 0 | 1 | 1 | 4-5 | 1 |

**Komandi dystir:**

21.06 Jugoslavia-Spania

21.06 Slovenia-Noreg

## Bólkur D

**Kekkia-Frakland 1-2 (0-1)**
0-1: Henry 7
1-1: Poborsky (br.) 35.
1-2: Djorkaeff 60.

**Danmark-Holland 0-3 (0-0)**
0-1: Kluivert 57.
0-2: R. De Boer 66.
0-3: Zenden 77.

**Støðan**

| | v | j | t | mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Frakland | 2 | 0 | 0 | 5-1 | 6 |
| 2 Holland | 2 | 0 | 0 | 4-0 | 6 |
| 3 Kekkia | 0 | 0 | 2 | 1-3 | 0 |
| 4 Danmark | 0 | 0 | 2 | 0-2 | 0 |

**Komandi dystir:**

21.06 Danmark-Kekkia

21.06 Frakland-Holland

# Eingin tekur Jarnbardin

***6–mannafør kvinnur:** Kvinnurnar umborð á Jarnbardi hjá róðrarfelagnum Knørri, vardu aftur í Runavík kapppróðrarheiðurin hjá havnarmonnum*



*Enn einaferð skúgvaðu tær á Jarnbardi alla mótstøðu til viks, og spurningurin tykist vera, um nakar annar bátur er førur fyri at gera nakað sum heilst við føroyameistararnar*

Higartil í ár hevur tað gingið striltið hjá sigursvandu róðrarfeløgunum í høvuðsstaðnum. Á norðoyarstevnu vóru tað bara kvinnurnar umborð á Jarnbardi, sum vunnu, og søgan endurtók seg á Skálafjørðinum. FM vinnarin frá í fjør kom eina bátslongd undan næsta bátinum á mál. Sigurin var ikki so sannførandi, sum hann var í Klaksvík, men tað var kortini ongantíð nakar ivi um, hvør fór at vinna.

Í Havnar Róðrarfelag hava tey vónað og roknað eitt sindur við, at kvinnurnar umborð á nýggja Gongurólvi skuldu gera um seg. Tað gjørdu tær ikki á norðoyarstevnu. Á eystanstevnuni fekk Gongurólvur ein fínan start, og fyrstu lítlu løtuna var líkt til, attær skulu geva Jarnbardi ta kappingina, sum tær umborð á Jarnbardi hava vónað, at tær fóru at fáa, men tað var so skjótt, at Gongurólvur dovnaði.

Merkisvert var tað, at um tað skuldi tosast um nakra kapping, so var tað frá tveimum støðum, sum ikki hava verið serliga frammarlaga í kapppróðri nógvu tey seinastu árini, at Jarnbardur fekk avbjóðingina.

Páll Fangi vann nógv tey fyrstu árini, tá kvinnurnar kappaðust í 6–mannaførum. Fyrsta árið, at kvinnurnar kappaðust um FM í 6–mannaførum, var í 1983. Páll Fangi vann fyrstu ferð FM í 1986, og síðani vunnu tær FM fleiri ferðir – umframt í 1986 vunnu tær eisini í 1987, í 1989 og aftur í 1990. Síðani tá hevur tað verið lítið at hoyrt til kvinnubátin í Klaksvík, men nú tykist glógva í aftur.

Páll Fangi taldist ikki millum tær í fremra endanum á fyrstu metrunum, men tá hálvt málið var rógvið, og Jarnbardur longu var vorðin leysur av Gongurólvi, sum inntil tá hevði fylgt væl við í oddinum, fóru klaksvíkskvinnur smátt um smátt at blanda seg uppí. Kappingin um næstfremsta plássið stóð leingi millum Gongurólv og Páll Fanga, men so dragnaði Gongurólvur, og tá bátarnir komu inn móti málinum, var Páll Fangi væl meiri frammanfyri nummar trý, enn Jarnbardur var frammanfyri Páll Fanga.

Tað hevur leingi verið lítið at hoyrt til kapppróðurin í Fuglafirði. Kvinnurnar umborð á Fuglfirðingi endaðu á triðja plássi. Hvessingur vann FM bæði í 1996 og í 1998. Higartil í ár hevur tað ikki skorist so væl hjá kvinnunum í Hvalvík og Streymnesi, sum tað hevur hjá monnunum. Hesa ferð endaðu tær á fjórða plássinum.

Jarnbardur tykist vera púra suverenur. Tær flestu hava róð í fleiri ár. Tær vunnu allar róðrarnar í fjør, og tað er sera ilt at siggja tann bátin, sum í teimum fýra FM kappingunum, ið eru eftir, skal hótta Jarnbardin.

Tey, sum vinna ofta og nógv í kapppróðri, plaga at gerast størstu hóttanirnar móti sær sjálvum. Svongdin eftir at vinna plagar at minka. Í løtuni tykist tað sum um, at sannlíkið er størst fyri, at tað eina ferð í framtíðini fer at vera hetta, sum fer at steðga sigursrøðini hjá Jarnbardi, um ungu kvinnurnar ikki sjálvar fara at siga upp, tá hetta róðrarárið verður liðugt.

jh

# FM-støðan

*Støðan í FM eftir kapppróðurin á Eystanstevnu*

**5-mannafør, dreingir**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Tjaldrið | 7 | 14 |
| 2 | Kollur | 5 | 9 |
| 2 | Havfrúgvin | 4 | 9 |
| 4 | Drekin | 4 | 7 |
| 5 | Sílið | 2 | 4 |
| 6 | Royndin Fríða | 1 | 2 |

**6-mannafør, kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Jarnbardur | 7 | 14 |
| 2 | Fuglfirðingur | 4 | 8 |
| 2 | Hvessingur | 3 | 8 |
| 4 | Páll Fangi | 5 | 5 |
| 4 | Gongurólvur | 2 | 5 |
| 6 | Sólmundur | 1 | 3 |
| 7 | Riddarin | 0 | 1 |

**5-mannafør, gentur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Frúgvin | 7 | 14 |
| 2 | Ørnin | 4 | 8 |
| 3 | Tjaldrið | 5 | 5 |
| 3 | Hvassi | 3 | 5 |
| 3 | Drekin | 2 | 5 |
| 3 | Beinta | 0 | 5 |
| 7 | Sílið | 1 | 2 |

**6-mannafør, menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Hvessingur | 7 | 14 |
| 2 | Hósvíkingur | 5 | 10 |
| 3 | Strálan | 4 | 7 |
| 4 | Gongurólvur | 3 | 5 |
| 4 | Kollfirðingur | 1 | 5 |
| 6 | Sólmundur | 2 | 3 |

**8-mannafør, menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Argjabáturin | 7 | 14 |
| 2 | Toftabáturin | 5 | 10 |
| 3 | Gullbrandur | 4 | 7 |
| 3 | Nevið Reyða | 3 | 7 |
| 5 | Húsavíkingur | 2 | 2 |
| 5 | Oyndri | 0 | 2 |
| 7 | Miðvingur | 1 | 1 |
| 7 | Kvívíkingur | 0 | 1 |

**10-mannafør, menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Nólsoyingurin | 7 | 11 |
| 2 | Vestmenningur | 4 | 11 |
| 3 | Havnarbáturin | 5 | 10 |
| 4 | Eysturoyingur | 3 | 6 |
| 5 | Vágbingur | 2 | 4 |
| 6 | Kjølur | 1 | 1 |